# Til sølu
## Honda CR-V 2.0 4x4




Árg. 6/99 · koyrt 88.000 km
Bilurin er í góðum standi.
**Kr. 138.000,-**

**Útgjald bert kr. 27.600,- Fígging kann veitast fyri 4% rentu p.a.**

LANDSINS LAGALIGASTA BRÚKTBILAFÍGGING

**Bilfríðkan á Hjalla**

TEL 21 73 00
sí meira á WWW.BILFRIDKAN.FO

Sosialurin 341800

# Til sølu
## Fiat Punto




Árg. 4/2001 · koyrt 70.000 km
Í góðum standi
Sera lætta powerstýring.
**Kr. 68.000,-**

**Útgjald bert kr. 13.600,- Fígging kann veitast fyri 4% rentu p.a.**

LANDSINS LAGALIGASTA BRÚKTBILAFÍGGING

**Bilfríðkan á Hjalla**

TEL 21 73 00
sí meira á WWW.BILFRIDKAN.FO

Sosialurin 341800

## Sópingarbilur til sølu



KÄRCHER

Sera lítið nýttur og í avbera góðum standi.

Nýprísur 285.000,-!!

Ring og gev eitt tilboð!

| | |
|---|---|
| Framdrift: | Diesel |
| Max. ferð(Km/t): | 16 |
| Koyrt: | 126 tímar |
| Arbeitt: | 55 tímar |
| Árgangur: | 2000 |

**RING 21 52 10**

# Frá Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag

Limafundur verður í Virkinum á Sandi fríggjakvøldið 25. november kl. 19.30

Við á fundinum verða: Jóannes Eidesgaard, løgmaður, Hans Pauli Strøm, landstýrismaður og Gerhard Lognberg, løgtingsmaður

Okkurt verður til matna, felagssangur og burturluting.

Við javnaðarkvøðu.

**Nevndin**

**Javnaðarflokkurin**
www.javnadarflokkurin.fo



## SEV søkir eftir rakstrarleiðara

**Starvið sum rakstrarleiðari fyri SEV verður hervið lýst leyst at søkja.**

Rakstrarleiðarin hevur ábyrgdina av, at ravmagnsverkið hjá SEV verður rikið samsvarandi 5. bólki í sterkstreymsreglugerðini („stærkstrømsbekendtgørelsen").

Sambært teirri sterkstreymsreglugerð, ið kom í gildi 1. oktober 2005, hevur SEV sum virkiseigari ábyrgdina av, at ein trygdargóðskuskipan verður gjørd og hildin viðlíka fyri SEV.

Ein høvuðsuppgáva hjá nýsetta rakstrarleiðaranum verður at skipa fyri hesum arbeiði, ið skal vera liðugt í seinasta lagi 1. oktober 2006.

Rakstrarleiðarastarvið er ábyrgdarstarv. Rakstrarleiðarin hevur mótvegis SEV-stýrinum ábyrgdina av, at trygdarviðurskiftini í SEV til hvørja tíð eru í lagi.

Nærri reglurnar fyri starvinum eru ásettar í sterkstreymsreglugerðini. Sambært hesum reglum hevur rakstrarleiðarin m.a. ábyrgdina av, at neyðug starvsfólk, amboð og útgerð eru tøk til uppgávur, ið skulu fremjast, eins og rakstrarleiðarin hevur ábyrgdina av, at sakkunnleikin hjá starvsfólkinum støðugt verður hildin viðlíka.

Rakstrarleiðarin skal átaka sær aðrar uppgávur eftir nærri avtalu í tann mun hetta samsvarar við starvið.

Rakstrarleiðarin skal hava eina útbúgving, ið kann góðkennast sambært sterkstreymsreglugerðini. Talan kann vera um sterkstreymsverkfrøðing, el-installatør ella annan persón, ið kann skjalprógva at hava neyðuga ástøðiliga vitan um og praktiskar royndir við rakstri av el-verkum.

Stýrið fyri SEV setir, eftir tilmæli frá stjóranum, rakstrarleiðaran, og rakstrarleiðarin arbeiðir við tilvísing til stýrið. Starvið verður sett sambært serligum sáttmála millum SEV og rakstrarleiðaran.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt eftir nærri avtalu.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum sendast grannskoðaranum hjá SEV, Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn, og umsóknirnar skulu vera latnar inn í seinasta lagi tann 12. desember 2005.

Elfelagið
SEV

Sosialurin 341800

# Handilslærlingur

**Vit sóknast eftir lærlingi til HVS deildina hjá P/F Mariu Poulsen, Smyrilsvegur 8**

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi starv, við dagligum avbjóðingum og góðum arbeiðsumhvørvi.

**Førleikakrøv:**
FHS ella HH er ein treyt fyri at byrja sum lærlingur í handilsvinnuni.

**Vit vænta at tú ert:**
Røsk/raskur, fyrikomandi og von/vanur við at fáast við fólk. Harafturat er tað ein fyrimunur um tú hevur aðrar royndir ella útbúgvingar innan handilsvinnuna, men hettar er eingin treyt.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum er, fríggjadagin 16. desember 2005.

Eru spurningar, eru tygum altíð vælkomin at ringja á tel 31 20 00

**pf Maria Poulsen & Co.**
BOX 182 · FO-110 TÓRSHAVN

Sosialurin 341800

# Uppsitarahjúnini



*Birita og Kjalnes Petur*

*Kjalnes Petur var sonur Jóannes Petersen úr Saltnesi*

*Birita var yngsta barnið hjá Jákupi Jacobsen (yngra Jákupi) á Miðgerði.*

*Eftirkomarar teirra hava givið bók út, ið er at fáa í bókabúðunum.*

Sosialurin 341800

# Sjálvbodnir sløkkiliðsmenn
## Norðskála-Oyri-Oyrabakki

Sunda kommuna søkir eftir frívilligum sløkkiliðsmonnum frá Norðskála-Oyrarbakka ella Oyri til Sunda sløkkilið. Umsøkjarar skulu vera millum 20 og 40 ár og hava stóra koyrikortið. Heilsan skal vera í lagið, tí sløkkiliðsarbeiði er krevjandi. Kommunan rindar fyri heilsukanningina.

Tað verður veitt samsýning fyri venjing, sløkki- og bjargingarbeiði.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Signheðin Davidsen, brunaumsjónarmann á tlf. 218588.

Umsóknir skulu vera brunaumsjónini í hendi í seinasta lagi 8. desember 2005.

**Sunda kommuna**

Lesið Sosialin - so eru tit við